## HM-undankappingin 2006

**Bólkur 1**

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Holland | 5 | 4 - 1 - 0 | 12 | 3 | 9 | 13 |
| 2 Kekkia | 5 | 4 - 0 - 1 | 10 | 5 | 5 | 12 |
| 3 Rumenia | 6 | 3 - 1 - 2 | 10 | 7 | 3 | 10 |
| 4 Finnland | 6 | 3 - 0 - 3 | 13 | 10 | 3 | 9 |
| 5 Makedonia | 6 | 1 - 2 - 3 | 6 | 7 | -1 | 5 |
| 6 Armenia | 6 | 1 - 1 - 4 | 4 | 13 | -9 | 4 |
| 7 Andorra | 6 | 1 - 1 - 4 | 3 | 13 | -10 | 4 |

**Bólkur 2**

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Ukraina | 6 | 4 - 2 - 0 | 11 | 3 | 8 | 14 |
| 2 Grikkaland | 6 | 3 - 2 - 1 | 10 | 6 | 4 | 11 |
| 3 Danmark | 6 | 2 - 3 - 1 | 10 | 6 | 4 | 9 |
| 4 Turkaland | 6 | 2 - 3 - 1 | 8 | 5 | 3 | 9 |
| 5 Albania | 6 | 2 - 0 - 4 | 3 | 9 | -6 | 6 |
| 6 Georgia | 5 | 1 - 2 - 2 | 6 | 8 | -2 | 5 |
| 7 Kasakhstan | 5 | 0 - 0 - 5 | 2 | 13 | -11 | 0 |

**Bólkur 3**

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Portugal | 5 | 4 - 1 - 0 | 20 | 3 | 17 | 13 |
| 2 Slovakia | 5 | 4 - 1 - 0 | 17 | 4 | 13 | 13 |
| 3 Russland | 5 | 3 - 1 - 1 | 12 | 9 | 3 | 10 |
| 4 Letland | 5 | 2 - 1 - 2 | 10 | 12 | -2 | 7 |
| 5 Estland | 6 | 2 - 1 - 3 | 9 | 13 | -4 | 7 |
| 6 Liektenstein | 6 | 1 - 1 - 4 | 9 | 16 | -7 | 4 |
| 7 Luksemburg | 6 | 0 - 0 - 6 | 4 | 24 | -20 | 0 |

**Bólkur 4**

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Írland | 5 | 2 - 3 - 0 | 7 | 2 | 5 | 9 |
| 2 Frakland | 5 | 2 - 3 - 0 | 4 | 0 | 4 | 9 |
| 3 Ísrael | 5 | 2 - 3 - 0 | 7 | 5 | 2 | 9 |
| 4 Sveis | 4 | 1 - 3 - 0 | 9 | 3 | 6 | 6 |
| 5 Cypros | 5 | 0 - 1 - 4 | 4 | 11 | -7 | 1 |
| 6 Føroyar | 5 | 0 - 1 - 4 | 2 | 12 | -10 | 1 |

**Bólkur 5**

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Italia | 5 | 4 - 0 - 1 | 9 | 5 | 4 | 12 |
| 2 Noreg | 4 | 2 - 1 - 1 | 6 | 3 | 3 | 7 |
| 3 Slovenia | 4 | 2 - 1 - 1 | 4 | 3 | 1 | 7 |
| 4 Hv.russland | 3 | 1 - 1 - 1 | 8 | 5 | 3 | 4 |
| 5 Skotland | 4 | 0 - 2 - 2 | 1 | 4 | -3 | 2 |
| 6 Moldova | 4 | 0 - 1 - 3 | 1 | 9 | -8 | 1 |

**Bólkur 6**

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Ongland | 5 | 4 - 1 - 0 | 11 | 3 | 8 | 13 |
| 2 Póland | 5 | 4 - 0 - 1 | 18 | 5 | 13 | 12 |
| 3 Eysturríki | 5 | 2 - 2 - 1 | 10 | 8 | 2 | 8 |
| 4 No. Írland | 5 | 0 - 3 - 2 | 5 | 12 | -7 | 3 |
| 5 Wales | 5 | 0 - 2 - 3 | 5 | 10 | -5 | 2 |
| 6 Aserbadjan | 5 | 0 - 2 - 3 | 1 | 12 | -11 | 2 |

**Bólkur 7**

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Serbia-Montenegro | 4 | 3 - 1 - 0 | 10 | 0 | 10 | 10 |
| 2 Spania | 4 | 2 - 2 - 0 | 8 | 1 | 7 | 8 |
| 3 Litava | 4 | 2 - 2 - 0 | 6 | 1 | 5 | 8 |
| 4 Belgia | 4 | 1 - 1 - 2 | 5 | 6 | -1 | 4 |
| 5 Bosnia-Hersegovina | 3 | 0 - 2 - 1 | 2 | 5 | -3 | 2 |
| 6 San Marino | 5 | 0 - 0 - 5 | 0 | 18 | -18 | 0 |

**Bólkur 8**

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Svøríki | 5 | 4 - 0 - 1 | 17 | 2 | 15 | 12 |
| 2 Kroatia | 4 | 3 - 1 - 0 | 10 | 2 | 8 | 10 |
| 3 Bulgaria | 4 | 2 - 1 - 1 | 9 | 7 | 2 | 7 |
| 4 Ungarn | 4 | 2 - 0 - 2 | 5 | 8 | -3 | 6 |
| 5 Ísland | 5 | 0 - 1 - 4 | 4 | 14 | -10 | 1 |
| 6 Malta | 5 | 0 - 1 - 4 | 1 | 13 | -12 | 1 |

Bólkavinnararnir koma beinleiðis til endaspælið. Tveir teir bestu 2'ararnir koma eisini beinleiðis víðari. Seinastu seks 2'ar-arnir spæla sínamillum play-off dystir um seinastu plássini. Støðan millum 2'ararnar verður uppgjørd eftir, hvussu hesir hava staðið seg móti nummar 1, 3, 4, 5 og 6 í sínum bólki.



*John O'Shea og Clinton Morrison fegnast um leiðslumálið hjá Írlandi í Tel-Aviv. Og hóast Ísrael fekk javnað, so er einki at ivast í, at lagið á írum er gott. Teir hava nú leikt úti móti Fraklandi, Sveis og Ísrael, og hava í øllum trimum førunum fingið javnleik heim við sær*

*Mynd: Reuters*

# Gott lag á grønu oynni

**Eftir at hava leikt teir tríggjar truplastu dystirnar, er Írland framvegis oddalið í okkara HM-undan-kappingarbólki**

**HM-FÓTBÓLTUR**
*Jákup Mørk*

Leygardagin var hópur av landsliðsfótbólti á skránni kring alt Europa, og aftur mikukvøldið eru nógvir dystir, sum skulu avgreið-ast.

Úr einum føroyskum sjónarhorni er kanska mest áhugavert, hvussu støðan í okkara bólki skikkar sær, og her kann helst staðfest-ast, at higartil eru tað írar, sum eru best fyri. Talan er tó um at kalla javnstøðu, har Írland, Frakland og Sveis øll hava níggju stig fyri fimm dystir, og har Ísrael hevur seks stig fyri fýra dystir, og í so máta er einki avgjørt. Men eftir at teir hava leikt útidystir móti øllum hinum oddaliðunum, mugu írar sigast at vera teir, sum standa við bestu kortunum.

Leygardagin var enntá um reppið, at teir fóru avstað við øllum í útidyst-unum móti Ísrael, efrir at Clinton Morrison tíðliga hevði lagt írar framum. Í evstu løtu eydnaðist tó vert-unum at javna, soleiðis at teir framvegis halda støð-una sum ósigraðir.

Hjá fraklendingum kom tað helst illa við, at teir á heimavølli aftur máttu taka til takkar við javnleiki. Hesaferð við 0-0 móti grannunum úr Sveis.

Hjá grannum okkara í norðanlondum var nakað misjavnt, hvussu páskirnar hilnaðust.

Danir vunnu væntaða 3-0 sigurin á Kasakhstan, tá annars útskeldaði Peter Møller stóð fyri tveimum av málunum, og á útivølli gjørdi Svøríki bart við einum 3-0 sigri á Bulgaria.

Finnar vóru um reppið at skapa eina hálva sensatión, tá teir komu upp á 3-3 í útidystinum móti Kekkia, men bara tríggjar minuttir fyri leiklok eydnaðist kekk-um at avgera dystin til egn-an fyrimun.

Ísland var á vitjan í Kroatia, og her gjørdist tal-an um greiðan 4-0 sigur til heimaliðið.

Og mikukvøldið verða so aftur dystir á skránni. Tá hevur Danmark sera trupl-an útidyst móti Ukraina, og í okkara bólki verður spennandi at vita, hvussu leikur fer, tá Frakland kemur á vitjan í Ísrael.

### Úrslitini leygardagin

**Bólkur 1**
Armenia-Andorra 2-1 (1-0)
Kekkia-Finnland 4-3 (2-0)
Rumenia-Holland 0-2 (0-1)

**Bólkur 2**
Georgia-Grikkaland 1-3 (1-2)
Turkaland-Albania 2-0 (2-0)
Danmark-Kasakhstan 3-0 (2-0)

**Bólkur 3**
Estland-Slovakia 1-2 (0-0)
Liektenstein-Russland 1-2 (1-2)

**Bólkur 4**
Ísrael-Írland 1-1 (0-1)
Frakland-Sveis

**Bólkur 5**
Italia-Skotland 2-0 (1-0)

**Bólkur 6**
Ongland-Norðurírland 4-0 (0-0)
Wales-Eysturríki 0-2 (0-0)
Póland-Aserbadjan 8-0 (3-0)

**Bólkur 7**
Belgia-Bosnia-Hersegovina 4-1 (2-1)

**Bólkur 8**
Bulgaria-Svøríki 0-3 (0-1)
Kroatia-Ísland 4-0 (3-0)

### Dystir mikukvøldið

**Bólkur 1**
Andorra-Kekkia
Makedonia-Rumenia
Holland-Armenia

**Bólkur 2**
Ukraina-Danmark
Georgia-Turkaland
Grikkaland-Albania

**Bólkur 3**
Estland-Russland
Letland-Luksemburg
Slovakia-Portugal

**Bólkur 4**
Sveis-Cypros
Ísrael-Frakland

**Bólkur 5**
Moldova-Noreg
Slovenia-Hvítarussland

**Bólkur 6**
Póland-Norðurírland
Eysturríki-Wales
Ongland-Aserbadjan

**Bólkur 7**
Bosnia-Hersegovina-Litava
San Marino-Belgia
Serbia & Montenegro-Spania

**Bólkur 8**
Kroatia-Malta
Ungarn-Bulgaria